***Kunning um konsertina “1. flokks sangur” í Norðurlandahúsinum 12. juni***
***- eitt samstarv millum Tórshavnar Musikkskúla og fólkaskúlarnar í Tórshavnar Kommunu***

Uml. 250 næmingar eru í 1. flokks árganginum skúlaárið 2018/19

Hvør skúli fær eitt pláss antin í Klingruni ella Skálanum, har børnini kunnu leggja klæðir, taskir o.a. og kunnu halda til áðrenn konsertina.

**Aðalroynd verður týsdagin 11. juni kl. 10.00-12.00**

- Børnini møta stundisliga, soleiðis at tey eru klár á pallinum kl. 10.00
- Tá verða allir 10 sangirnir á skránni sungnir saman við orkestrinum, sum hevur fylgispælið.
- Børnini royna eisini at ganga inn á pallin.

**Konsertirnar verða í stóru Høllini mikudagin 12. juni kl. 17.00 og kl. 18.00**

- Børnini møta kl. 16.30 – tey halda til í Skálanum ella Klingruni
- Ímillum konsertirnar fáa børnini frukt og okkurt at drekka í Skálanum og Klingruni
- Atgongumerkjasølan byrjar 30. mai kl. 10.00
- Kostnaðurin er 20 kr og sølan fer fram á www.nlh.fo
- Norðurlandahúsið hevur hesar áheitanir til foreldur:
  1) um ikki at keypa fleiri atgongumerkir enn tørvur er á at brúka
  2) um ikki at parkera frammanfyri høvuðsdyrnar, tá ið tit seta børn av ella heinta tey
- Konsertirnar vara ein góðan hálvan tíma, tvs. børnini eru klár at verða heintað kl. 18.45

Tað hevur týdning, at lærararnir hjá flokkunum eru til staðar, bæði áðrenn, undir aðalroyndini og undir konsertunum. Minimum 1 lærari pr 25 næmingar. Lærararnir fáa pláss at sita framvið pallinum, eins og í fjør.

Frá Tórshavnar Musikkskúla eru tað Kári Bæk og Joanna Johansen, ið standa fyri sanginum, umframt eitt orkestur (7 tónleikarar), ið hevur fylgispæl.

Teir 10 sangirnir, ið børnini fara at syngja eru:

1. Dorius
2. Eg fái mær eitt krit
3. Eg gekk mær
4. Ein stutt ein long
5. Hulduríman
6. Lítla Elsa
7. Másin sigur pli pli pli
8. Og gentan hon fer í dansin
9. Sjá nú stígur sólin
10. Eg veit ein mann (kanon) – ikki við í dropbox leinkjuni.

Her er leinkja til sangirnar. Vinarliga gevið hana víðari til viðkomandi lærarar:

https://www.dropbox.com/sh/fc2nt7eok13m5zg/AABWZ-gYlMy1WRL4_OBtLJqja?dl=0